# Jólabýur í SMS

22. november varð jólabýurin í SMS tendraður. Sum vant, so eru her nógvir áhugaverdir lutir av ymsum slag at síggja. Kavin liggur um alt torgið, sum er snollað upp til endamálið. Og ikki minst er stuttligt at síggja mongu vættrarnar, sum stákast, nú alt skal gerast klárt til jóla.

Fram til jóla ber til hjá øllum, sum ferðast í SMS at skoða vakra býin. Torgið skal eisini nýtast til onnur endamál, og tí verður býurin tikin niður, longu millum jól og nýggjár. Men fyri tað eru stundirnar góðar at uppliva hugnan á Torginum. Seinastu dagarnar undan jólum er SMS nevnliga opið til klokkan 20 hvørt kvøld.

Eisini leggur jólamaðurin sjálvur leiðina fram við nakrar av hesum døgunum, so tað er eingin sum helst umbering fyri ikki at vera í jólahýri.



*Vakri jólabýurin í SMS er aftur í ár at síggja á Torginum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

























